# Ferðin skal niður

**TÍÐINDASKRIV**
*Ráðið fyri Ferðslutrygd*



Hvat hevði hent, um vit øll lækkaðu ferðina við í miðal 10 km/t ?

Jú, vit høvdu mist uml. 3 minuttir hvønn dag. Men afturfyri høvdu vit minkað um árliga talið av álvarsliga skaddum við 8 fólkum.

Talið av materiellum bilskaðum hevði minkað við u.l. 300

Tá ið vit tosa um ferðsluvandar, kunnu vit ikki koma uttan um, at størsta einstaka orsøkin til, at ferðsluvanlukkur henda, er ov nógv ferð. Tað eru eingi viðurskifti í ferðslutrygdargranskingini, ið eru so væl skjalprógvað, sum sambandið millum ferð og ferðsluvanlukkur. Úrslitið av hesi gransking er púra greitt: økir tú ferðina, økir tú eisini vandan fyri, at ferðsluvanlukkur henda. Og jú meira ferðin er, tess álvarsligari verða vanlukkurnar.

Neyvan man hetta úrslit koma óvart á nakran - og helst kundu vit spart útreiðslurnar av granskingini, um vit bara fylgdu vanligum viti og skili.

Tað var vitið og skilið, sum gjørdi, at fólk fyrst í hesi øldini kendu ampa á sær, tá ið hesir ókendu og osandi jarnhestarnir, sum vóru nevndir automobilar, við miklan gang fóru rullandi í gjøgnum gøturnar.

Ferðin hjá automobilunum tá var um 10-15 km/t, og hon var hildin at vera alt ov nógv. Í onkrum býi var óttin fyri hesum nýggja akfari so stórur, at skipað varð fyri, at tá ein automobilur koyrdi í gøtum, har eisini fólk vóru til gongu ella á hestbaki, skuldi maður renna frammanfyri hann og veipa við flaggi at ávara fólk, at nú kom ein automobilur.

Síðani er nógv broytt og nú er tað ikki longur fólk og krýatúr, sum hava fyrstarætt á vegnum, nú eru tað bilarnir, sum eiga øll rættindini. Hetta henta akfar, sum kann flyta teg skjótt úr einum stað í annað. Fyri at hetta skal kunna henda skjótari og skjótari, verða bilarnir gjørdir alsamt betri og betri og vegirnir gjørdir slættari og beinari.

Tað sær út sum um, at tað er altavgerðandi, at tíðin, tú nýtir at koma til arbeiðis, at vitja fólk osfr, skal vera so stutt sum gjørligt. Í staðin fyri at koyra 80, verður heldur koyrt eini 90-100 ….fyri at spara tíð, verður sagt. Hvussu nógva tíð spara vit so?

Koyrir tú t.d. úr Leirvík til Havnar, so sparir tú bara 4 minutt, um tú í miðal koyrir 90 í staðin fyri 80, sum er loyvda markið. Mangur man kenna hetta aftur, at síggja bilar, sum yvirhála allan vegin suðureftir. Tá ið tú so at enda kemur til ferðsluljósini i miðbýnum í Havn, hendir meira enn so, at bilurin, sum gjørdi allar tær mongu vandamiklu framumkoyringarnar, er í somu biðirøð sum tú, bara nakrar fáar bilar longri frammi.

Hvat hevði hent, um vit øll lækkaðu ferðina við í miðal 10 km/t? Jú vit vildu mist uml. 3 min hvønn dag. Men afturfyri høvdu vit minkað um árliga talið av álvarsliga skaddum við heili 8 fólkum. Talið av materiellum bilskaðum hevði minkað við eini 300. Eisini vildu vit brúkt minni av brennievni og harvið eisini dálkað minni. Ein ferðlækking upp á 10 km/t vildi eisini ført til minni slit.

Í Null - hugsjónini, hvørs endamál er, at eingin skal lata lív ella verða álvarsliga skaddur í ferðsluni, er ein av aðaltáttunum, at ferðmarkið má verða sett niður - ikki bara á vegum millum bygdir, men serliga á vegum, har fólk til gongu ella á súkklu verða blandað saman við bilum. Her verður mælt til at hægst loyvda ferð er 30 km/t.




FØROYA LANDFÚTI
POLITIMEISTARIN

## KUNNING FRÁ FÚTASKRIVSTOVUNI UM PASS

Tann 1. oktober 2004 verður nýggja útgávan av føroyska/danska passinum tikin í nýtslu.

Nýggja passið er eitt hátøkniligt trygdarpass.

Onki krav verður sett um umbýtan av galdandi passi!

Av tí at nýggja passframleiðsluútgerðin er so kostnaðarmikil, er avgerð tikin um at gevast við passframleiðsluni í Føroyum, soleiðis at øll passframleiðsla verður miðsavnað í Danmark.

Hetta ger, at møguleikin hjá fútaskrivstovuni í skundi at útskriva nýtt pass eftir 1. oktober 2004 dettur burtur. Í staðin ber til í summum førum at framleingja verandi pass ella at fáa útflýggja "provisorisk" (fyribils) pass.

Hetta førir eisini við sær, at passavgreiðslutíðin tá verður umleið 2 - 3 vikur. Tí er alneyðugt, at fólk, ið hava tørv á nýggjum passi eftir 1. oktober 2004, umbiðja passið í góðari tíð.

Frá 1. oktober 2004 kunnu børn undir 15 ár ikki verða skrivaði í pass hjá foreldrum ella øðrum og skulu tá hava egið pass.

Mannagongdin at umbiðja pass verður hin sama sum nú. Passavgreiðslur eru á fútaskrivstovuni í Havn og á politistøðunum uttanfyri Havnina.

Upplýsingar um pass annars eru tøkar á heimasíðuni hjá politinum: www.politi.fo

M. Nepper-Christensen

Smyrilsvegur 20 Postboks 3018 FO-110 Tórshavn Tel (+298)351448 Telefax (+298) 351452



ISS

SØKT VERÐUR EFTIR FULLTÍÐARFÓLKI TIL REINGERÐING FRÁ MÁNADEGI TIL FRÍGGJADAG

Ikki er neyðugt at reingerðing skal vera náttararbeiði ella vikuskiftisarbeiði.

Hjá ISS kanst tú fáa eitt reingerðingsarbeiði í gerandisdøgunum.

Vit søkja eftir einum vaskifólki til fiskaídnaðin í Tórshavn.
Arbeiðstíðin er uml. 40 tímar um vikuna, frá kl. 15.00 til 23.00 mánadag til fríggjadag.

Løn sambært galdandi sáttmála, uml. 22.400 + frítíðarpening.

TREYTIR:
· At tú ert fyrikomandi
· At tú ert røkin
· At tú ert arbeiðssamur / arbeiðssom
· At tú hevur kunnleika til reingerðing innan fiskivinnuna

Upplæring fært tú frá okkum.

Er hetta nakað fyri teg, ella ynskir tú fleiri upplýsingar, ert tú vælkomin at seta teg í samband við okkum:

Jens-Ole Næsborg, deildarleiðari
gerandis dagar millum kl.13.00 - 17.00
á tel 21 88 84 ella 31 88 84

ISS Føroyar · Tinghúsvegur 14, 4 hædd · FO-100 Tórshavn
www.iss.dk



P/F ALMA
Maskinverkstaður & Smiðja

CATERPILLAR
Entreprenørmaskinur við fígging



Á hjalla 15 · Boks 1338 · 110 Tórshavn · tel 31 58 90 · fax 31 04 68 · jan@alma.fo





WWW.TEMPUR.DK



TEMPUR - í serflokki!
Royn TEMPUR - og uppliva hvussu madrassur og pútur okkara kunnu broyta lív títt...



Tempur er eitt visko-elastiskt hitakensluligt tilfar, sett saman við smáum opum, ið laga seg nágreinuliga eftir kroppinum. Smáopini lata luft ferðast gjøgnum madrassuna, soleiðis at kropshitin ikki broytist.

TEMPUR
TRÝSTLINNANDI MADRASSUR OG PÚTUR

IDEmøblar

Uppi á Hálsi
Tórshavn
Tel 354680



## Stovnið breiðband fyri

0,- kr.*)

Prísir úr 280,- kr./mðr.

Stovnar tú I-net Breiðband frá Føroya Tele, geva vit tær stovningina púra ókeypis - tú sparir 750,- kr.

| Nýtslutørvur | Nýtslumynstur | Prísur/mðr. | Ferð | Nýtslugjøld |
|---|---|---|---|---|
| Lágur | Surf, postur, chat og spæl | **Kr. 280,-** | 256k/128 | 50 oyru/Mbyte. kl. 08-18<br>40 oyru/Mbyte. kl. 18-08<br>Nýtt Príslækking! |
| Miðal til stórur | Surf, postur, chat, spæl og tónleikur | **Kr. 595,-** | 512k/128 | **ÓKEYPIS upp til 2 Gbyte**<br>50 oyru/Mbyte. kl. 08-18<br>40 oyru/Mbyte. kl. 18-08<br>Nýtt Príslækking! |
| Stórur | Surf, postur, chat, spæl, tónleikur og filmur | **Kr. 895,-** | 1024k/128 | **ÓKEYPIS upp til 3 Gbyte**<br>50 oyru/Mbyte. kl. 08-18<br>40 oyru/Mbyte. kl. 18-24<br>ÓKEYPIS kl. 24-08<br>Nýtt Príslækking! |

Ring 808080, vitja www.tele.fo ella eina telebúð og fá I·net Breiðband til júst tín tørv...

I·net BREIÐBAND

*) Treytað av at tú teknar I·net privat breiðbandhald frá Føroya Tele í 6 mðr. Tilboðið er galdandi til og við 1. oktobur 2004. Vanligur prísur fyri stovning er kr. 750,-. Montørgjald og mótald, ið kann keypast frá Føroya Tele, er ikki íroknað. Sí meira á www.tele.fo.

FØROYA TELE

petur & petur - 320870



TOYOTA



Ups...

Hann snurraði so fínt í áðni, men nú letur ikki í honum. Tað einasta, ið hoyrist, er afturvendandi klikkið av hazardljósinum. Hvat nú?

6 mánaða garanti Reyni Service bjóðar nú eina spildurnýggja tænastu og eina eyka trygd til tey, ið ynskja ein brúktan bil, við nærum eins góðari trygd, sum var hann nýggjur.

Vit bjóða nú 6 mánaða garanti uppá bilar, ið kosta meira enn kr. 85.000,-

Garanti skipanin, ið hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-, fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, ið eygsæð ikki skyldast nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar ella væntandi tænastueftirlit. Eingin gandur og eingir smáir bókstavir.

Kom og vitja okkum á landsins fremstu bilasølu.

TEAM85 TEL. 358000

Vegurin Langi · Hoyvík · Tel. 353040 · Fax 353041
rs@reyniservice.fo · www.reyniservice.fo

REYNI SERVICE P/F